

# – Vit skulu spæla fyri at vinna

**– Eg hevði ongantíð sagt nei til danska landsliðið, um boð vóru eftir mær. Jú, kanska um teir ringdu í dag, so hevði eg noktað at spælt í meira enn ein hálvleik, sigur landsliðsvenjarin Henrik Larsen, sum vit hittu á heimavølli í Vedbæk til eitt prát um fótbólt, taktikk, sigrar, vónbrot og landsliðsavboð**

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*

**Vedbæk:** Hvussu í allari víðu verð eru vit endaðir her?

Vit standa í einum lítlum villakvarteri í Norðursælandi. Stóru húsini sleppa at breiða seg, og smalu vegirnir snúgva sær millum trøini og húsini. Landslagið liggur opið mest sum til allar síðir, og tað andar friður, hóast trivaligu bilarnir í túnunum hótta við sínum stóru motorum.

Blaðmaðurin og myndamaðurin skulu hitta føroyska landsliðsvenjaran heima hjá honum í Vedbæk, og vit hildu okkum verða í tryggum hondum, tá ið vit við neyð og deyð fingu ein taxabil á tokstøðini í Vedbæk.

Men hvar tann myrki hýruvognsførarin koyrdi okkum, er tann stóri spurningurin. Adressuna fekk hann á donskum, húsanummarið var lætt at siga, og so segði hann seg vita, júst hvar tað var. Koyrdi okkum til eitt villakvarter og steðgaði uttan fyri nummar 8.

– Her er tað, segði hann á hálvdonskum, áðrenn vit fóru úr bilinum...

Men tað var ikki har, sum hann helt tað var. Og so langt frá.

## Er tað Eriksson?

So nú standa vit her. Ikki idé fyri, hvar vit eru. Hava verið á gátt í nummar 8, men har var oyði. Og soleiðis er eisini á smáu gøtunum. Eingin at síggja. Eingin at spyrja.

Vit ganga eitt sindur. Tað er friðarligt og hugnaligt, fuglarnir syngja, og trøini hanga idylliskt inn yvir vegin. Men eina náttúrúútferð eru avgjørt ikki stundir til nú. Langt frá.

At vit eru fullkomiliga á skeivari leið verður prógvað, tá ið vit ganga okkum fram á eitt skelti við vegin.

»Birkerød« stendur tað við feitum, svørtum bókstavum.

Og so mitt í tí heila kemur hann – sum sendur av himmli. Ein hýruvognur. Bara soleiðis mitt í tí heila. Vit preiða hann og royna umaftur. Jú, hann kennir adressuna og legst á at koyra.

Men meðan hann koyrir, fer hann at ivast í, um vit hava biðið um bilin.

– *Eru tit Eriksson?*

Ja, tað er stóri spurningurin. Vit kundu kanska verið Eriksson. Eg meini so við, ein norðurlendingur og annar. Men vit eru ikki Eriksson, hóast vit fyri alt í verðini høvdu viljað verið tað júst nú.

Onkur hevur bílagt bilin, og tað eru ikki vit. Skal hann nú tveita okkum út. Nei, tað ger hann ikki.Hesin myrki hýruvognsførari forbarmar seg yvir okkum, og tað er betur skil í honum. Hann koyrir okkum inn í eitt nýtt villakvarter, og nú er tað farið á líkjast.

## Drívmegin rullar

Hurðin verður latin upp, og nú sær betur úr. Stóri og smilandi landsliðsvenjarin hjá føroyingum bjóðar okkum inn. Vit ringdu í allari neyðini til hansara og søgdu frá, hví vit vóru seinkaðir. Og nú stendur hann bara og flennir eftir okkum.

Henrik Larsen býr í Vedbæk, norðan fyri Keypmannahavn. Hann, konan og bæði børnini húsast í einum rúmligum húsum í einum friðarligum kvarteri, men teinurin inn í meldurin í danska høvuðsstaðnum er stuttur.

Tað eru nøkur ár, síðani 37 ára gamli Henrik Larsen gavst at spæla fótbólt á høgum stigi. Hann hevði annars eina spennandi yrkisleið og spældi fyri bæði donsk og útlendsk feløg – í Týsklandi, Italia og Onglandi. Hann spældi 39 landsdystir fyri Danmark, og hann hevði ein avgerandi fót við í spælinum, tá ið Danmark púra óvæntað vann europameistaraskapin í fótbólti í 1992.

Eftir, at hann gavst sum fótbóltsspælari, legði hann seg alt fyri eitt á venjarabógvin. Fyrst í FC Keypmannahavn, sum var seinasta felag sum yrkisspælari, síðani í Ølstykke, áðrenn hann fyri tveimum árum síðani tók við leiðsluna av føroyska landsliðnum.

– Eg var ongantíð í iva um, at tá ið eg fór at gevast sum spælari, so vildi eg halda fram innan fótbóltin. Fótbólturin hevur havt so nógv at siga fyri meg gjøgnum alt lívið, og hann er framvegis tað, sum drívur meg, sigur Henrik Larsen.

## Fótbóltur fram um skúlan

Tað er ruddiligt, men heimligt heima hjá Henrik Larsen. Við køksborðið er útsýnið yvir grasplenuna, og við italskum kaffi á borðinum greiðir hann frá, at fótbóltur altíð hevur verið nakað serligt hjá honum.

– Eg byrjaði at spæla sum fýra ára gamal, og gjøgnum barnaárini hevði fótbóltsspælið altíð meira at siga, enn skúlin hevði. Eg vildi heldur spæla bólt á vøllinum við skúlan enn at sita inni í skúlastovuni, og vit spældu hvønn einasta dag.

Fótbólturin vant alt meira upp á seg, so hvørt sum Henrik Larsen kom upp í tannáringaárini. Sum 18 ára gamal fór hann at spæla við Lyngby, og eftir tað fekk yrkisleiðis rættiliga ferð á. Skúlin kom framvegis í aðru røð, hóast hann tók skrivstovuútbúgving í Lyngby.





Hesin málningur, sum Henrik Larsen fekk til gávus, hongur í einum kamari heima hjá honum

Mynd: Jonhard Hammer

– Eg var eitt skifti so nógv burtur frá skúlanum, tí eg spældi fótbólt, at eg hevði bara verið tríggjar tímar í týskum seinasta hálva árið, áðrenn eg skuldi til próvtøku.

Men soleiðis var tað bara. Fótbóltur kom áðrenn skúlan, og spælið við leðurkúluni kom at fylla alt meira í lívinum hjá Henrik Larsen.

Í 1990 fór hann til útlandið at spæla fótbólt, og har var hann næstu árini. Fyrst í Pisa í Italia, síðani í Aston Villa í Onglandi, og so í Waldhof Mannheim í Týsklandi, áðrenn hann kom heimaftur til Lyngby og síðani skifti til FCK.

## Á toppinum í Svøríki

Henrik Larsen hevur spælt á ungdómslandsliðum og á A-landsliðnum hjá Danmark, og tað var í landsliðstroyggjuni, at hann hevði sini allarstørstu upplivilsi sum spælari. EM í 1992 er hæddarpunktið í donskum fótbólti, og tá var Henrik Larsen mitt í meldrinum.

Tað, sum kulimineraði í 1992, byrjaði á ungdómslandsliðum í 1986. Hann og fleiri aðrir av teimum, sum mannaðu danska landsliðið í 1992, spældu saman á fleiri ungdómslandsliðum.

– Árini frá 1986 og frameftir vóru fantastisk. Vit ferðaðust runt til eina rúgvu av londum kring heimin og vóru við í kappingum. Vit høvdu eitt sera gott landslið við nógvum profilum, og vit fingu góð úrslit í øllum kappingunum, sum vit vórðu við í.

Spælarar sum Schmeichel, Laudrup og Povlsen spældu eisini á hesum landsliðum, og teir vóru profilar, tá ið danir tóku alt Europa á bóli til EM kappingina í Svøriki í 1992.

– Fótbóltur er meira enn nakað annað eitt liðspæl. Hóast vit høvdu nógvar profilar á okkara landsliðum, so kom liðið altíð fram um einstaklingin. Tí kundu vit vinna EM í 1992, hóast vit als ikki høvdu fyrireikað okkum til kappingina, heldur Henrik Larsen.

Danmark varð innkallað til kappingina, tá ið kríggj brast á í fyrrverandi Jugoslavia. Skoðbráið var stutt, og hóast spælararnir vóru farnir í feriu, so settu teir kós móti Svøriki, og har avrikaðu teir nakað heilt serstakt.

– Nógvir av okkum høvdu spælt saman á ungdómslandsliðum í fleiri ár, og vit høvdu eitt sera gott samanhald. Tað gjørdi, at vit kundu fáa so gott úrslit, hóast vit ikki høvdu fyrireikað okkum eins væl og hini londini og kanska heldur ikki vóru í eins góðari venjing.

Men samstundis sum landsliðstroyggjan hevur givið Henrik Larsen minniligar løtur, so er størsta fótbóltssorgin eisini í somu troyggju. Størsta vónbrotið var í 1993, tá ið Danmark sum europameistari ikki megnaði at spæla seg til HM-endaspælið árið eftir.

Avgerandi dysturin í Sevilla endaði við 1-0 sigri til Spania, hóast spaniólar spældu stóran part av dystinum við 10 monnum. Danmark skuldi bara hava javnleik, men kláraði tað ikki.

## Faxe og tilboð úr Føroyum

Nú stendur Henrik Larsen á odda fyri einum landsliði, og hóast føroyingar ikki kunnu reypa sær av somu avrikum, sum danir kunna, so hevur føroyskur landsliðsfótbóltur fingið nógv góð úrslit gjøgnum árini.

– Eg royni at brúka royndirnar hjá mær sum spælari í venjarastarvinum. Til dømis ber tað til at læra av dystinum í Sevilla, tí tú mást skapa nakað í fótbólti, um tú vilt hava góð úrslit og vinna. Tú mást royna at leypa á, skapa kjansir og gera mál, og tað gjørdu vit ikki í nóg stóran mun ímóti Spania, og tí kundu vit ikki vinna.

– Eisini á føroyska landsliðnum skulu vit betra okkum har frammi á vøllinum. Vit skapa altíð kjansir, men vit skulu gerast betri at fáa nakað burtur úr okkara møguleikum. Og tað rokni eg eisini við, at vit fara at fáa, og so koma eisini góð úrslit og sigrar, sigur landsliðsvenjarin.

Hann var venjari í danska felagnum Ølstykke, tá ið hann gjørdist evni til føroyska landsliðið. Fótbóltssambandið hevði millum annað verið í sambandi við John »Faxe« Jensen, og umvegis hann kom eisini Henrik Larsen inn í myndina. Hann hittist við FSF í Keypmannahavn, og partarnir gjørdust samdir um samstarv.

– Sjálvt um onkur í fyrstuni spurdi meg, hví eg fór til Føroyar at verða venjari, so er tað stór virðing um føroyskan fótbólt og tey úrslit, sum føroyska landsliðið hevur fingið gjøgnum árini.

– Eg ivaðist ikki nógv í at taka av tilboðnum úr Føroyum. Ølstykke er ikki nakað stórfelag, og at standa á odda fyri einum landsliði tóktist sum ein spennandi avbjóðing.

## Spælarar fingu longri snór

Hóast Henrik Larsen er ungur í venjarayrkinum, so hevur hann longu funnið sær ein stíl, sum hann vil hava sum venjari.

– Míni lið skulu altíð spæla fyri at vinna. Mær dámar ikki, at útgangsstøðan er, at vit skulu halda 0-0, sigur hann.

Hann heldur, at tað er umráðandi at spælararnir ikki verða óloysiliga bundnir í taktiskum skipanum.

– Spælarar skulu ikki púra setast í bás, teir skulu hava frælsi undir ábyrgd. Á vøllinum er tað umráðandi, at tað eisini er pláss fyri einstaklingum, men reindyrkað egoisma er einki fyri meg. Liðið hevur altíð størri týdning enn einstaklingurin.

Tá ið Henrik Larsen tók við eftir Allan Simonsen á føroyska landsliðnum, varð tað samstundis slakað eitt sindur, tá ið spælararnir vóru saman. Teir vórðu ikki so bundnir í fríløtunum til landsliðssamlingar, sum teir vóru hjá Allan Simonsen, og nýggi venjarin gav spælaranum eitt sindur longri snór.

– Tú fært ikki góðar spælarar av at seta teir á hotellkamar. Tí havi eg einki ímóti at lova spælarunum út, um teir vilja sleppa okkurt ørindi – bara teir halda tær tíðirnar, sum vit annars hava í sambandi við venjingar, máltíðir og annað.

Henrik Larsen hevur júst longt sína avtalu við FSF, so at hann eisini skal standa á odda fyri landsliðnum til komandi HM-undankappingina, har størsta avbjóðingin er Frakland.

Onkrar søgur hava verið frammi í donskum fjølmiðlum um, at feløg hava havt áhuga í at fáa Henrik Larsen til venjara, men hann letur seg ikki nerva av hesum.

– Mítt útgangspunkt er, at eg haldi tær avtalur, sum eg geri.

– Tað eru nógvir møguleikar í fótbóltsheiminum, men alt er eisini so óvíst. Men tá ið tú hevur verið í fótbólti í so nógv ár, so venur tú teg við tær treytirnar. Eg havi tað fatan, at arbeiði innan fótbóltin er ikki nakað, sum tú søkir, tað er nakað, sum tú fært boðið.

## Todi á landsliðnum

Henrik Larsen hevur ikki havt møguleikan at brúka sterkasta føroyska álopsvápnið í landsdystum, sum hann hevur havt ábyrgdina av. Tey flestu munnu taka undir við pástandinum um, at hevði Todi Jónsson verið millum teir 11 allar dystirnar í seinastu undankapping, so høvdu føroyingar fingið fleiri mál – og kanska okkurt stigið afturat.

– Todi hevur sagt, at hann skuldi verða frískur í eitt hálvt ár, áðrenn hann fór at umhugsa landsliðið aftur, so tað sær svart út hjá okkum. Sjálvandi saknaðu vit Toda í seinastu undankapping, hann kundi uttan iva havt gjørt onkur mál fyri okkum, sigur Henrik Larsen.

– Todi er nú komin í tann aldurin, at skaðar fara at arga meira, og tí er tað bara hansara avgerð, um hann vil spæla á føroyska landsliðnum. Eg góðtaki tað valið, sum hann ger. Eg hevði sjálvur ongantíð sagt nei til danska landsliðið, um boð vóru eftir mær. Jú, kanska um teir ringdu í dag, so hevði eg noktað at spælt í meira enn ein hálvleik.

Prátið er nú komið at enda. Konan og dóttirin eru komin heim, og tygara útsendu hava fingið tað, teir skuldu hava við sær heim. Onkrar myndir eru eftir at taka, og aftan á myndatøkuna takka vit fyri okkum.

Henrik Larsen hyggur upp á okkum, og hesaferð er tað ein hvítur maður, sum forbarmar seg yvir okkum.

– Er tað ikki best, at eg koyri tykkum á tokstøðina?



Henrik Larsen gevur fuglunum

Mynd: Jonhard Hammer